BALSLEV SØKIR
starvsfólk til Byggibúðina

Vit sóknast eftir sølufólki til málingadeildina í Byggibúðini at seta sum skjótast.

Vit vænta:
- at tú ert faklærd/ur, men tó eingin treyt.
- ert millum 25-40 ár.
- hevur áræði og góðan hug til handilsarbeiði.
- hevur lætt við at samstarva við onnur.

Vit bjóða:
- løn samb. S & K
- góðar arbeiðsumstøður.
- góðar arbeiðsfelagar.

Um tú heldur at hetta er nakað fyri teg, so send okkum skrivliga umsókn við møguligum viðmælum.

Fleiri upplýsingar um starvið, fáast við at tosa við Eyðun Hansen, e-mail: eh@balslev.fo.

pf. Balslevs Timburhandil & Byggibúð
Postboks 3309
110 Tórshavn

Tel. 31 11 22 www.balslev.fo

Framsýning í Kollafirði

Framsýning av handaligum næmingaarbeiði verður í skúlanum í Kollafirði sunnudagin 6. apríl kl. 14.00-19.00.

Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli

»Rejsehuset Kurselskabet«

Leygardagin 5/4 kl. 16.00 heldur Ryszard Nickel frá »Rejsehuset Kurselskabet« fyrilestur um túrar til frama fyri heilsuna, til Póland og onnur lond, fyri fólki við gikt og øðrum, ið bara vilja »forkela« seg sjálvi.

Fyrilesturin verður í Skálanum í Tórshavnar kommunuskúla leygardagin kl. 16.00.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Kunngerð

Vegna upprudding á vinnuøkinum hjá Tórshavnar kommunu á Hjalla,eystanfyri Litaval matr. nr. 1oe, verða øll tey, sum eiga eitthvørt á hesum øki, biðin um at taka tað burtur innan hósdagin 1. mai 2003, ella verður tað burturbeint uttan aðra ávaring og fyri eigarans rokning.

SNARSKIVAN

Kaj Andreasen & Co
Heilsóla • smásóla • umboð
Tel. 31 36 00 • www.andreasen.fo

Trygdarskógvar

- Snøggir trygdarskógvar av týskari góðsku. Uttan iva teir bestu í landinum
- 8 ymisk sløg á goymslu
- Vit hava trygdarútgerð til øll endamál
- Skeltir til allar uppgávur!
- Handskar til øll endamál

Sosialurin 311820

BMW 320 CI

árg. 2001, km 19.000. Til sølu um hóskandi boð fæst. Nýprísur: kr. 365.000. 17" dekk á felgum fylgja við.

Tlf. 211208

Almenn móttøka

Í sambandi við at Sverre Midjord, varaborgarstjóri fylti 70 ár 2. apríl, og hevur verið býráðslimur í góð 40 ár, herav borgarstjóri í 17 ár, verður almenn móttøka á Hotel Tvøroyri sunnudagin 6. apríl frá kl. 14.00 til 17.00.

Øll eru hjartaliga vælkomin

Tvøroyrar býráð

TVØROYRAR KOMMUNA

Til sølu:

Lastbilar og kranar

- Scania 113, ren. motor. Bilurin er í góðum standi
- HIAB 19 tons við nýggjari fjarstýring
- HIAB 1165 uttan fjarstýring

P/F Sandgrevstur
Telefon 225221/444121

Opið hús verður í dag 5. apríl frá kl. 10 til 17 í sambandi við stjóraskifti.

Fiat Stilo Multi Wagon

Fiat Ulysse

Í hesum sambandi bjóða vit okkurt til matna og ballónir til børnini, høvi verður eisini at síggja og royna teir nýggju Fiat Stilo Multi Wagon og Ulysse

Bilfriðkan við Velbastaðvegin Tlf 317300 - 100 Tórshavn

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Býlingshúsið undir Fjalli

Í Býlingshúsinum undir Fjalli ganga 52 børn.

Stovnurin er skipaður við 2 barnagarðsstovum við 20 børnum í hvørjari og einari vøggustovu við 12 børnum.

Á stovninum eru 14 starvsfólk.

Vit bjóða eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur ein stóran leiklut í gerandisdegnum.

www.torshavn.fo

Pedagogur til Býlingshúsið undir Fjalli

Tórshavnar kommuna søkir eftir einum pedagogi 30 tímar um vikuna í vøggustovu við 1 til 3 ára gomlum børnum. Starvið verður sett 1. mai 2003.

Vit ynskja
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og megnar at taka avgerðir í tínum arbeiði.

Setanarviðurskifti
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meiri fæst at vita
um starvið við at venda sær til Katrina Joensen, leiðara, tlf. 314665 ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

Umsókn
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Býlingshúsinum undir Fjalli, Fjalsgøta 25, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi týsdagin 22. apríl 2003.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Tórshavnar Ellisheim

Á Tórshavnar Ellisheimi búgva 25 búfólk.

19 starvsfólk starvast á heiminum á V.U. Hammershaimbsgøtu.

www.torshavn.fo

Reingerðarfólk

Tórshavnar Ellisheim søkir eftir reingerðarfólki at arbeiða 1/2 tíð fyrrapart.

Setanarviðurskifti
Starvið verður sett 1. mai 2003, løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag

Meiri fæst at vita
um støðvini við at venda sær til Sólgerð Djurhuus, fyristøðukvinnu, tlf. 311839.

Umsókn
skal vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi týsdagin 22. apríl 2003. Viðmerk á umsóknina: "reingerðarfólk".

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



Tórshavnar Býarsavn

Tórshavnar Býarsavn hevur virkað sambært løgtingslóg nr. 17 frá 9. mai 1972 um bygdasøvn við mentanarsøguligum virksemi síðani 1987.

Býarsavnið er stovnur undir mentamálanevnd býráðsins og er ogn hjá Tórshavnar kommunu. Býarsavnið verður stýrt av eini nevnd, sum er vald av býráðnum, og hevur evstu ábyrgdina av savnsrakstrinum. Virkisumdømi býarsavnsins er Tórshavnar kommuna, fyribils við serligum denti á Tórshavnar bý.

Savnsvørðurin stendur fyri umsitingarligu leiðsluni av savninum. Savnsvørðurin virkar sum skrivari hjá savnsnevndini og stílar fyri virkseminum við heimildum frá henni.

www.torshavn.fo

Savnsvørður til Tórshavnar Býarsavn

Mentamáladeildin søkir eftir savnsvørði til Tórshavnar Býarsavn at byrja skjótast gjørligt.

Uppgávur
Høvuðsuppgávan hjá savnsvørðinum verður at vera leiðari á Tórshavnar Býarsavni. Savnsvørðurin skal m.a. virka fyri
- at savna, skráseta og framsýna lutir og annað mentanarsøguligt tilfar, sum lýsa livihátt, starvslíkindi og mentan til ymsar tíðir, ella eru knýttir til søguligar hendingar í virkisumdømminum
- at savna munnliga goymd søguminni við atliti at virkisumdøminum og hava hetta tilfar greitt til vísindaliga gransking
- at skipa fyri søgu- og mentanarfrøðiligum kanningum við atliti at savnsvirkseminum
- at fyrireika og standa fyri fornfrøðiligum rannsóknum í virkisumdøminum í samstarvi við Landsantikvarin
- at vegleiða Tórshavnar býráð um mentanarsøgulig fyrilit at sýna í sambandi við byggisamtyktir og byggiloyvi.

Persónligur og fakligur førleiki
- hevur akademiska útbúgving í mentanarsøgufrøðiligum vísindum frá lærdum háskúla
- hevur góð samstarvsevni
- er ágrýtin, miðvísur og kann arbeiða sjálvstøðugt
- er til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar
- hevur førleika í føroyskum
- hevur granskingarførleika ella savnsførleika

Vit kunnu bjóða
eitt fakligt krevjandi starv við spennandi avbjóðingum og samstarvi við aðrar stovnar og myndugleikar. Eisini kunnu vit bjóða førleikamennandi umstøður at virka undir.

Setanarviðurskifti
Starvið verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag. Talan kann møguliga vera um, at starvið verður áramálasett í 5 ár.

Meiri fæst at vita
um starvið við at venda sær til Andras Mortensen, formann í savnsnevndini, telefon 317201/215039 ella Jákup Simonsen, deildarleiðara á mentamáladeildini, telefon nr. 315160.

Umsókn
saman við prógvum, royndum og CV, skulu vera Tórshavnar kommunu, Mentamáladeildini, Postboks 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 29. apríl 2003.